


# Statoil útbygging skapar 700 arbeiðspláss í Aberdeen

**Jan Müller**

05.09.2013 - 17:37

Oljan.fo

Eitt av stóru tíðindunum á oljumessuni í Aberdeen í hesum døgum er avgerðin hjá Statoil av álvara at fara undir at fyrireika dýrastu útbyggingina av einum oljufelti í bretskum øki í meira enn 10 ár. Talan er um Mariner verkætlanina, sum fer at kosta 40 mia. kr. og skapa hundraðtals nýggj arbeiðspláss í Aberdeen. Júst henda útbyggingin fær tær stóru yvirskriftirnar, tí hon fer at skapa so mong arbeiðspláss og samtíðis hava við sær eina rættiliga stóra framleiðslu av tungari ráolju.

Byrjað verður nú at byggja upp eina rakstrarfyritøku í Aberdeen við meira enn 700 fólkum. Uppgávan er at standa fyri útbyggingini av Mariner fundinum, sum varð funnið fyri 30 árum síðani, men sum hevur verið mett tøkniliga at vera ov torført at byggja út vegna tungu oljuna í undirgrundini. Nú er hon kortini búgvin til at verða bygd út. Ætlanin er at framleiða olju í meira enn 40 ár. Roknað verður við fyrstu framleiðsluni í 2017

Tað er greitt, at tíðindini vera sera væl móttikin í Skotlandi, tí henda útbyggingin kann fáa stóran týdning fyri búskapin og ikki minst fyri arbeiðsplássini.